# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Heri Mohr 85 ár



Fríggjadagin 19. mars fyllir Heri Mohr í Havn 85 ár.

Heri er havnarmaður, sonur Amaliu Mohr (f. Egholm) og Einar Mohr, telegrafist.

Heri vaks upp á Skansagarði úti á Reyni, men sum stórur smádrongur flutti hann við familiuni í nýggju húsini yviri við Strond - tað einasta húsið sum var har um leiðir tá. Undir krígnum bleiv húsið tikið av eingilsmonnum, og búðu tey Undir Pisuvarða øll krígsárini.

Heri hevur arbeitt sum roknskaparmaður stóra partin av sínum lívi. Hann arbeiddi hjá hjá Thomas Dam, Wenzel Petersen og Leif Waagstein. Í 1957 byrjar hann at arbeiða á Føroya Gjaldstovu sum roknskaparleiðari, seinni bleiv hann fulltrúi. Í 30 ár arbeiddi Heri sum tænastumaður, og í 1987 gjørdist hann stjóri á Føroya Gjaldstovu. Hetta starv røkti hann til 1. november 1991.

Heri giftist við Maritu Pálsdóttir Hansen, úr Gøtu, í 1950. Tey fingu 5 børn: Sigrún, Biritu, Tordis, Maluna og Gunnar. Eisini eigur Heri dóttrina Lis umframt abba- og langabbabørn. Marita andaðist 2. apríl 2009, 84 ára gomul.

Heri hevur havt stóran áhuga fyri Havnar Bóltfelag. Hann var við til at endurstovna HB-stuðlar og sat har sum kassameistari í nógv ár. Í HB-stuðlum er hann gjørdur heiðurlimur fyri sítt stóra arbeiði har. Heri fylgir væl við í tí sum hendir í føroyska samfelagnum. Ofta síggjast hansara viðmerkingar og lesarabrøv í bløðunum.

Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**- red**



*Týsdagin vórðu avtalurnar undirskrivaðar, f.v.: Heri Kjærbo frá Kirkjuligu Heimamissiónini, Rúna Sivertsen frá ABC barnahjálp, og Ása Andreasen frá verkætlanini "Ein tími um árið"*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Næstan 100 túsund komu inn

Týsdagin 16. mars vórðu avtalur undirskrivaðar millum ABC barnahjálp, Kirkjuligu Heimamissiónina og verkætlanina "Ein tími um árið" um tær næstan hundraðtúsund krónurnar sum komu inn fyri 2010.

"Ein tími um árið" hevur gjørt eina avtalu við ABC barnahjálp og eina avtalu við Kirkjuligu Heimamissiónina í sambandi við pengingin sum kom inn.

Verkætlanin Ein tími um árið er ein hjálparfelagsskapur, ið byrjaði í Føroyum í juni 2009. Hugskotið aftanfyri verkætlanina er, at "Ein tími um árið" savnar inn tímalønir og letur hesar til ein viðurkendan hjálparfelagsskap. Hvørt ár velur "Ein tími um árið" ein nýggjan hjálparfelagsskap og virkar sostatt sum undirleverandør til hjálparfelagsskapir.

Í ár fór peningurin til ABC barnahjálp og Kirkjuliga Heimamissiónina. Gjøgnum Kirkjuligu Heimamissiónina stuðlar verkætlanin einari ommu og hennara 7 ommubørnum í Kambodia, við m.a. nýggjum húsum og mati og skúlagongd til børnini í upp til 2 ár. Harumframt stuðlar verkætlanin seks foreldraleysum børnum í Liberia gjøgnum ABC barnahjálpina.

Inn komu tilsamans 97.448,00 krónur. Av hesum fara kr. 40.000 fara til Kirkjuligu Heimamissiónina, sum stuðul til ommuna og hennara sjey ommubørn í Kambodia, meðan kr. 57.448,00 fara til ABC barnahjálp, sum stuðul til 6 foreldraleys børn í Liberia.

Koma fleiri tímalønir inn á kontoina hjá "Ein tími um árið" í 2010, verða hesar fluttar til ABC barnahjálp, sum stuðul til verkætlan teirra í Liberia, sigur Ása Andreasen í Havn, sum er stigtakari til verkætlanina. Hugskotið til verkætlanina kom í 2004, tá ein tsunami rakti stóran part av Stillahavinum. Hendan stóra og óhugnaliga vanlukkan varð varpa út gjøgnum sjónvarpið og øll verðin var í sjokk. Av tí at vit fingu hesar myndirnar inn gjøgnum sjónvarpsgluggan dagliga, kundu vit ikki lata verða við at hjálpa, sigur Ása Andreasen. Heimasíðan hjá verkætlanini: www.eintimi.com

**mg**

# MERKISDAGAR

**60 ára føðingardagur**
Mikudagin 7. apríl 2010 verði eg 60 ár, føðingardagsveitslan verður hildin í Skálanum í Klaksvík, leygardagin, 10. apríl kl. 19. Tey sum ynskja at gleða meg við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin at boða frá við at ringja ella senda sms til telefon 211988, ella við t-posti til isak@football.fo helst áðrenn 5. apríl. Heilsan Ísak Mikladal, Klaksvík.

**70 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 19. mars verður Hargin Joensen, Sumba 70 ár. Dagurin verður hildin í heiminum.

**70 ára føðingardagur**
Týsdagin 23. mars verður Jens Erik Rasmussen (Ras) á Toftum 70 ár. Dagurin verður hildin í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum fríggjadagin 26. mars frá kl. 19.

**85 ára føðingardagur.**
Fríggjadagin 19. mars fyllir Heri Mohr 85 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 23. mars hava Heidi og Jan Abrahamsen á Strondum silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Kelduni frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 17. apríl hava Helga og Jørgin Gleðisheygg Nes, Gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík, kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tey ið vilja gleða okkum við at koma verða biðin um at siga frá innan 8. apríl á tlf. 447160 ella 270876

**Diamantbrúdleyp**
Ruth og Robert á Lakjuni, Fuglafirði, halda diamantbrúdleyp í bygdarhúsinum í Leirvík 26. mars kl. 18.30. Tey, ið ynskja at gleðast saman við teimum hetta kvøld, biðjast siga frá, seinast hósdagin, tann 18. mars, á tlf. 444 332, fartelefon 744 332 ella við telduposti hg.vang@kallnet.fo

**Brúdleyp**



Leygardagin 27. mars kl. 12 giftast í Kelduni í Skálafirði, Birita Ingolfsdóttir Heinesen, Norðagøtu og Levi Tróndarson Nybo, Hvítanes. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 16. Opið hús verður kl. 21 í Oasuni, Kirkjustrætið 4, Hoyvík, har øll eru hjartaliga vælkomin at heilsa uppá brúðarparið.

**Brúdleyp**



Leygardagin 27. mars giftast Linda Ziska Jacobsen, Tórshavn og Gunleif Lyngvej Poulsen, Sandvík. Vígslan verður í Havnar kirkju kl. 11. Móttøkan verður í Miðlahúsinum í Tórshavn frá kl. 13-15.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

**Prógv**
Noomi Gregersen úr Klaksvík tók 2. mars prógv sum Cand. Scient á Center for psychiatrisk forskning Aarhus Universitets hospital, Risskov, institut for human genetik, Aarhus.

## Guðrið á tónleikafestivali í Texas



*Guðrið Hansdóttir skal framføra á størsta tónleikafestivalinum í Amerika*

Guðrið Hansdóttir er á hesum døgum í Austin, Texas, har hon skal framføra á størsta tónleikafestivali í Amerika, sum eitur SXSW (South by South West). Yvir 1900 bólkar frá øllum heiminum fara at framføra á 80 ymiskum pallum í býnum.

Umframt at spæla á festivalinum skal Guðrið eisini spæla fleiri konsertir í Austin við bólki. Við sær hevur hon tónleikarar, sum hon kom í samband við síðst hon var í Texas. Við í bólkinum er millum annað Paula Jean Brown, ið er kend frá bólkinum Sparklehorse og Go Go's.

"Hetta er avgjørt tann størsti møguleikin eg nakrantíð havi fingið í mínari seks ára longu karrieru, og eg eri ógvuliga spent upp á hvussu framførslurnar hjá mær fara at ganga", sigur Guðrið Hansdóttir úr Texas.

Festivalurin, sum verður hildin á hvørjum ári, verður í døgunum 17.–21. mars 2010.

**Dagurin**
18. mars. Aleksandur, deyður umleið 250. Hann kom úr Aleksandriu og endaði sum biskupur í Jerúsalem. Fleiri ferðir varð hann atsøktur fyri trúgv sína, men komst undan og doyði ein natúrligan deyða, og varð blóðvitni uttan blóð, sum tikið varð til.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*